Nýggj stýrisskipan áðrenn næsta val

Áðrenn valið verður vónar Marita Petersen, at Føroyar hava fingið eina nýggja stýrisskipan. Eina skipan sum gevur okkum tað neyðuga grundarlagið fyri at kunna virka sum eitt sjálvstøðugt samfelag, og møguliga at broyta viðurskifti okkara við Danmark

Tá samgongan millum javnaðar- og fólkaflokkin tók við, var ein »sjálvstýrislóg« millum tað, niðurfelt varð í samgonguskjalið.

Men eftir fyrstu »biddaraferðina« til Danmarkar, var ikki nógv tosað um hesa ætlan. Jógvan Sundstein segði enntá við danska sjónvarpið, at »ingen på Færøerne taler højt om selvstyre i dag«.

Men Marita Petersen heldur avgjørt ikki at vit skulu sleppa øllum ætlanum um einar sjálvbjargnar Føroyar

Nýggj stýrisskipan

Hetta landsstýrið hevur sum greitt mál, at áðrenn valið verður, skulu vit hava fingið eina nýggja stýrisskipan í Føroyum, sigur hon.

Ein nevnd situr í løtuni og skrivar uppskot um nýggja stýrisskipan. Og millum tað, nevndini er álagt at gera uppskot um, er ein ráðharraskipan í landsstýrinum.

- Eg haldi tað vera sera skeivt, at landsstýrið framvegis virkar sum eitt kollegialstýri, sigur løgmaður. Tað ger tað trupult at plasera ábyrgdina fyri tí ið gjørt verður, og tað skapar ongan greiðan skilnað millum løgting og landsstýrið.

Marita Petersen heldur, at ein stórur partur av okkara stýrisskipan byggir á leivdir frá amtstíðini.

- So leingi landsstýrið er eitt kollegialstýrið er tað t.d. meira at samanbera við eitt amtsráð enn eina stjórn, heldur hon

Møguleikar fyri sjálvbjargni

Orsøkin til at Marita vil hava eina nýggja stýrisskipan er, at hetta kann vera ein karmur einar sjálvbjargnar Føroyar.

Men tað merkir ikki, at hon vil hava loysing.

- Eg haldi bara at vit hava eina skyldu at geva eftirkomarum okkara ein karm sum ger, at vit sjálvi kunnu taka okkum av øllum okkara viðurskiftum. Og vilja fólk so fara longur í framtíðini, skal tað ið hvussu er ikki vera okkara egna stýrisskipan, ið forðar fyri tí

Viðvíkjandi viðurskiftunum við Danmark hevur Marita nakað somu støðu, sum undanmaður hennara, Atli Dam. Hon vil hava at føroyingar gerast so sjálvbjargnir, at vit »fara heilt at loysingini«, uttan kortini at loysa heilt.

Fyrireiking til sjálvstýrislóg

Spurd hvussu verður við sjálvstýrislógini, sigur Marita

- Henni hava vit ikki slept enn. Men eg haldi tað vera rætt fyrst at »rudda upp« hjá okkum sjálvum, áðrenn vit gera grundleggjandi broytingar í viðurskiftunum við Danmark

- Og eg haldi at ein nýggj stýrisskipan er eitt neyðugt grundarlag, áðrenn vit fara víðari

Lógargrundarlagið fyri oljuvinnu klárt í næsta mánaði

Stutt eftir ólavsøku fer landsstýrið í tingið við uppskotum um at samtykkja tær lógir sum skulu til, áðrenn oljufeløg kunnu byrja at gera seismiskar kanningar við Føroyar

Fyrst í ólavsøkutingsetuni - helst longu í næsta mánaði - fer landsstýrið í tingið við nøkrum lógaruppskotum, sum kanska fara at seta hol á eitt nýtt tíðarskeið í Føroya søgu: oljuvinnuna!

Marita Petersen greiðir frá, at talan verður um tvær høvuðslógir:

Onnur verður ein prinsipiell samtykt um, at Føroya Løgtingið gevur loyvi til, at farið verður undir fyrireikingar til oljuvinnu við Føroyar.

Hin verður ein lóg, sum skal gera tað møguligt at fara undir veruligar samráðingar við feløg, sum ynskja at fara undir seismiskar kanningar við Føroyar.

Neyðugt signal

Marita Petersen greiðir frá, at orsøkin til at hon vil hava hetta avgreitt sum skjótast, er, oljufeløg sýna rættiliga stóran áhuga fyri okkara øki í løtuni. Tí er neyðugt at vit senda teimum eitt týðuligt signal um, at vit eru áhugað.

- Eg vóni tað verður eitt samt Løgting sum verður við til hetta, sigur hon. Hetta er sera týdningarmikið mál og tað hevði verið óheppið, um bert landsstýrisflokkarnir stóðu aftanfyri tað.

Fara fram við varni

Marita leggur dent á, at tann løgtingssamtykt um oljuvinnuna, sum vónandi kemur áðrenn langt er liðið, ikki merkir at vit kasta okkum út í nakað óvist.

- Vit vita, at tað at geva fyritøkum loyvi til at vinna olju kann enda við eini katastrofu fyri okkum. Tí ræður um at vera sera varin á hesum øki. Men at geva loyvi til seismiskar kanningar kunnu vit kortini, uttan at óttast.

Men vónar kortini, at tær seismisku kanningarnar eisini kunnu hava viðsær arbeiðið í Føroyum.

- Hetta er ikki nakað sum krevur nógv fólk, men Føroyar eru hinvegin so smáar, at lítið skal til áðrenn tað merkist, heldur hon. Í fyrstu atløgu er tað sjálvsagt tænastuvinnan, sum kann fáa okkurt at gera tá feløgini koma hendanvegin, men so við og við kunnu aðrar vinnur fáa okkurt eisini

15-20 ár - so er liðugt

Í álitinum, oljunevndin hjá landsstýrinum skrivaði, verður sagt, at útvinning av olju við Føroyar valla fer at vara meira enn eini 15-20 ár - so er uppi

- Eg haldi hetta sigur okkum, at vit mugu vera varin áðrenn vit av álvara geva nøkur loyvi, sigur Marita Petersen.

- Tí nýtslan - bæði tann almenna og tann privata - kann lættliga fara upp so meðan oljan verður útvunnin og kastar nógv av sær. Og so standa vit knappliga heilt á berum, tá liðugt er.

ikki nýta tað til nakað.

Borgarin avger

- Og tað skerst ikki burtur, at allir politikararnir eru valdir eftir demokratiskum prinsippum, leggur hon afturat.

- Tað er veljarin - Føroya fólk - sum hevur valt - og afturvalt - teir politikarar, vit hava. Og skulu teir setast frá sum ráddu í áttati-árunum, er tað eisini veljarin, sum skal seta teir frá.